# Reglugerð fyri uttanhýsiseftirliti við Føroya Realkreditstovni

Vísandi til § 13, 4. petti í Ll. nr. 75 frá 5. november 1998 um Føroya Realkreditstovn hevur landsstýrismaðurin fyri uttanhýsiseftirlit við Føroya Realkreditstovni ásett fylgjandi:

## Bygnaður

§ 1. Uttanhýsiseftirlitið við Føroya Realkreditstovni verður lagt til skrivstovuna hjá Tryggingareftirlitinum, ið er stovnur undir Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum. Til tess at tryggja rationellan rakstur verður uttanhýsiseftirlitið umsitingarliga lagt saman við Tryggingareftirlitinum.

## Uppgávur

§ 2. Uttanhýsiseftirlitið útinnir eftirlit við ásetingunum í Kapitull 3 og 4 í Ll. nr. 75 frá 5. november 1998.

§ 3. Uttanhýsiseftirlitið ráðgevir landstýrismanninum um faklig viðurskifti viðv. Føroya Realkreditstovni og skal harvið eisini tryggja áhaldandi eftirmeting og kunning um royndirnar viðvíkjandi galdandi rættarreglum á økinum.

§ 4. Uttanhýsiseftirlitið skal á hvørjum ári í seinasta lagi 1. september leggja fyri landsstýrismannin eftirlitsfrágreiðing um uttanhýsiseftirlitsvirksemi, ella oftari um tørvur er á tí.

## Gjald fyri uttanhýsiseftirlitið

§ 5. Uttanhýsiseftirlitið/Tryggingareftirlitið sendur á hvørjum árið í januar uppgerð/rokning yvir brúkta tímanýtslu uppá Uttanhýsiseftirlitið til Føroya Realkreditstovn og við avriti til Fíggjarmálaráðið. Kostnaður fyri tíman verður ásett til 500,- kr.

## Gildiskoma

§ 6. Henda reglugerð kemur í gildi 1. desember 2015. Samstundis fer reglugerðin frá 1. mai 2004 úr gildi.

**Fíggjarmálaráðið**

Argir tann 30. november 2015

Kristina Háfoss
landsstýriskvinna

/Bjarni A. Bjarnason
aðalstjóri